## Betri umstøður til teknisku deild

- Nú kann arbeiði betri tilrættaleggjast, og umstøður eru at gera ymiskt viðlíkahaldsarbeiði innandura. Høllin er útgjørd við stórari bilhurð, so bilar og maskinur fáast inn. Eisini er møguligt at keypa inn í størri nøgdum, nú høllin eisini kann nýtast sum goymslupláss. Tað siga tekniski leiðarin hjá Nes kommunu, Aksel Højgaard og arbeiðsformaðurin, Jan Petersen. Upprunaliga var tað byggimeistarin á Toftum, Haldur Vang, sum bygdi høllina í samband við nógva virksemið, sum hansara felag hevði upp gjøgnum áttati-og nítiárini. Høllin, sum Nes kommuna nú eigur á Heygunum, er útgjørd við verkstaði, kantinu til arbeiðsfólkið og wc. Tað er Nes kommuna, sum ber hesi tíðindi á síni heimasíðu.



# Patriotur úr Klaksvík loysti stóran trupulleika í Suðuroy

**Vitjanin hjá landsstýrismanninum í heilsumálum í Suðuroy í gjár var óvanlig í allar mátar**

HEILSUVERK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Aksel V. Johannesen lurtar eftir krøvunum frá suðuroyingum og hann sissaði kravgongufólki, tí tað hann vissaði tey um, at vit eisini í framtíðini hava eina vælvirkandi heilsutænastu í Suðuroy*



*Aksel V. johannesen, landsstýrismaður, og embætisfólk hansaera, vórðu møtt av kravgongu, tá ið tey komu til Suðuroyar*

Aksel V. Johannesen hevur fingið stórt pluss í karakterbókina frá suðuroyingum.

Tað er greitt eftir eina fundarrøð, sum landsstýrismaðurin í heilsumálum hevði í Suðuroy í gjár um læknaligu støðuna í oynni.

Og sigast má, at væl eydaðist væl, tí tá ið landsstýrismaðurin fór norður aftur, var tað í besta forstáilsi við kommunulæknarnar, serlæknarnar og leiðsluna á Suðuroyar sjúkrahúsi og eini avtalu í skjáttini um, hvussu trupulleikin skal loysast.

Í hesum sambandi heldur hon, at tað var ein stórur fyrimunur, at landsstýrismaðurin er sjálvur úr einum útjaðaraøki.

- Tað sær út til, at tað skuldi ein patriotur í Klaksvík til at loysa trupulleikan í Suðuroy, sigur Marjun Olsen, sum var ein av teimum, sum fyrireikaði kravgongu í sambandi við vitjanina hjá landsstýrismanninum.

Hon hevur varhugan av, at av tí, at landsstýrismaðurin sjálvur kemur úr einum lokaløki, sum eisini merkir trupulleikar, hevur hann størri forstáilisi fyri trupulleikanum.

Og hon heldur eisini, at tað sást aftur í øllum mátanum, sum landsstýrismaðurin takklaði støðuna upp á.

- Vitjanin hjá Aksel V. Johannesen í Suðuroy var óvanlig í allar mátar, sigur Marjun Olsen.

Hon sigur, at tá ið embætisfólk og politikarar koma til Suðuroyar, er tað vanliga, at alt verður hurlað ígjøgnum, tí tað, sum alt snýr seg um, er fyri alt í verðini at lukkast norður aftur við Smyrli seinnapartin.

- Men so var ikki hesuferð, tí landsstýrismaðurin og embætisfólkini tóku sær ta tíð, sum kravdust til finan eina loysn og tað merkti, at fundur var eisini í alt gjárkvøldið fyri at finna eina loysn og tískil fór landsstýrismaðurin heldur ikki norður aftur fyrrenn í morgun.

Hon leggur afturat, at hon er sera væl nøgd við úrslitið, tí landsstýrismaðurin og læknar og leiðsla á Suðuroyar Sjúkrahúsi, samdust um eina avtalu, sum framtíðartryggjar heilsuverkið í Suðuroy.

- Tað var tað vit vildu hava og tað fingu vit, so tær fær ikki verið betri, heldur hon.

# Undir stórum trýsti

Suðuroyingar hava verið undir stórum trýsti seinastu tíðina, tí teir hava stúrt fyri, at øll læknaskipanin í oynni skal detta sundur.

Kommunulæknarnir hava boðað frá, at arbeiðsbyrðan er so stór, at ongin kommunulækni fer at tíma at arbeiða í Suðuroy.

Helt ítøkiliga hevur hetta ført við sær, at ein av yngru kommunulæknunum hevur biðið um farloyvi og ein annar ungur kommunulækni, sum ætlaði at søkja starv í Suðuroy, hevur trekt følihornini aftur og hevur boðað frá, at sum umstøðurnar eru nú, hevur hann ikki hug at verða kommunulækni í Suðuroy.

Somuleiðis eru tað serlæknar á sjúkrahúsinum, sum hava umhugsað sína støðu, tí teir fáa ov lítlar møguleikar at virka sum serlæknar, tí teir í ov stóran mun mugu taka sær av uppgávum, sum hjálparlæknar vanliga fáast við.

Tí var ovurstórur vandi fyri, at alt heilsuverkið í Suðuroy skrambladi saman.

Hetta var eisini orsøkin til, at landsstýrismaðurin í heilsumálum og topp-embætisfólk í heilsumálaráðnum, komu til Suðuroyar í gjár at royna at finna eina loysn.

At suðuroyingar taka støðuna í fullum álvara, sást av, at tá ið landsstýrismaðurin kom á Sjúkrahúsið, varð hann møttur av einum 300 fólkum í kravgongu.

Og kravið varð, at heilsuverkið í Suðuroy fær tað játtan, sum er neyðug fyri at framtíðartryggjað tað.

Og sigast má, at væl eydnaðist væl, tí tá ið landsstýrismaðurin fór norður aftur, var tað í besta forstáilsi við kommunulæknarnar, serlæknarnar og leiðsluna á Suðuroyar sjúkrahúsi og eini avtalu í skjáttini um, hvussu trupulleikin skal loysast.

### Greiður boðskapur

Men boðskapurin frá kravgongufólkinum til landsstýrismannin vóru púra greið.

- Vit eru ein javngóður partur av føroyska samfelagnum, og vit finna okkum ikki í, at verða sett lægri enn onnur, segði Marjun Olsen í eini stuttari røðu, hon helt fyri Aksel V. Johannesen, tá ið hann kom á sjúkrahúsið.

- Tað er tykkara einfalda skylda at syrgja fyri, at tað eisini verður trygt og liviligt her um okkara leiðir.

- Nú tað tekur at rapa, vóna vit, at tú krevur at eisini vit í syðra heilsuøkinum hava eitt rættvíst krav um trygd og trivna fyri børn, gomul, sjúk og veik, okkara millum.

- Hava tit ráð til dupultar skipanir fyri norðan, so vilja vit eisini vera við í býtinum fyri sunnan.

- Tað skal ikki at bera til longur ár um ár, at javna tveir stórar ein vegin og ein lítlan hin vegin, segði Marjun Olsen.